## Boða ikki frá

Grønlendskir veiðimenn halda ikki skylduna um at boða frá, hvørja ferð teir hava skotið ein hval ella eina ísbjørn, men mist fongin. Lógin sigur annars, at teir skulu boða myndugleikunum frá, tá teir hava sært eitt djór, men í seinastuni er tað hent minst tólv ferðir, at lógin er brotin, sigur grønlendaska útvarpið. Landsstýrið minnir nú veiðimenninar á lógina og sigur samstundis, at brot fáa ávirkan á kvotubýtið næsta ár.

# Hanus Hansen hevur onki at siga

**Manningin á Atlantic Navigator fýlist á, at tey fáa onki at vita og ósemja er um lønina hjá manningini. Men reiðarin vil onki siga**

ATLANTIC NAVIGATOR
*Áki Bertholdsen*

- Eg havi onki at siga.

Hanus Hansen, reiðari á Atlantic Navigator, er stuttorðaður, tá ið vit biðja hann um eina viðmerking til støðuna hjá landsins størsta fiskiskipi.

Reiðarin hevur annars verið burturstaddur í vikuni og hevði játtað at greiða frá støðuna í dag, men nú hevur hann broytt meining og ger greitt, at hann hevur ongar viðmerkingar yvirhøvur.

Atlantic Navigator hevur annars ligið við bryggju í tríggjar vikur. Og tað er greitt, at orsøkin til at hann liggur, er, at ongin svartkjaftur er at fáa og seinasta túrin teir gjørdu, drógu teir at kalla svart.

Men í Sosialinum í gjár fýltist fleiri av manningini á, at tey fingu als onki at vita yvirhøvur um støðuna og tað hildu tey vera ørkymlandi.

Tey vístu á, at talan er um eitt stórt arbeiðspláss við heili 110 fólkum og tí hildu tey, at tað var átaluvert, at tey als onga kunning fingu frá reiðaranum um støðuna og um, hvørji útlitini eru.

Samstundis sleppa tey ikki í ALS, tí tey eru ikki uppsøgd og summi av teimum, sum hava hús og heim at svara fyri, eru við at koma í fíggjarliga neyð av støðuni.

Samstundis kundu vit í Sosialinum í gjár eisini greiða frá, at ósemja er eisini um lønina hjá manningini. Bæði Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið vístu á, at tey vildu hava samráðingar um lønina hjá manningini. Men tey vístu samstundis á, at tað gekk strilti við samráðingunum og tískil var onki hent á økinum.

Fiskimannafelagið hevði hinvegin eina avtalu undir landi, men drálaði við at skriva undir, tí hendan avtalan skuldi samansjóðast viðavtalurnarhjáyvirmonnunum.



*Størsta fiskskip í landinum, Atlantic Navigator, hevur ligið í tríggjar vikur fyri fiskaloysi, men reiðarin, Hanus Hansen, vil ikki siga eitt orð um støðuna*

# Svartkjafturin líkist aftur sær sjálvum

**- Atlantic Navigator í Klaksvík er ikki einasta svartkjaftaskip, sum liggur fyri fiskaloysi. Tað gera øll onnur svartkjaftaskip eisini, tí tey drepa ikki livandi**

SVARTKJAFTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Svartkjaftaskipini drepa ikki livandi.

Atlantic Navigator er ikki einasta svartkjaftaskipið, sum liggur bundið fyri fiskaloysi. Tað gera øll onnur svartkjaftaskip eisini.

Hesar einastu vikurnar hevur púra onki verið at fáa.

Men hetta er ikki óvanligt, sigur Atli Hansen í Norðragøtu, sum er kendur reiðari á nótaskipum.

- Veruleikin er, at hesi seinastu árini hava verið heilt óvanlig við tað, at svartkjaftur hevur verið at fáa alt árið.

- Veruleikin er sostatt at nú er svartkjafturin aftur farin at líkjast sær sjálvum. Tað gamla er, at svartkjaftur er at fáa tað mesta av fyrra hálvári og at onki er at fáa seinna hálvár.

Og tað er hetta mynstrið, sum so spakuliga var farið at hómast fyri einum tveimum árum síðani, men sum var uppaftur týðiligari í fjør og sum hevur sligið heilt ígjøgnum í ár.

Atli Hansen sigur, at hesi seinastu árini hevur verið rættiliga nógv til av svartkjafti og í so máta hava hesi seinastu árini verið heilt óvanlig.

Fiskifrøðingar siga, at tá hevur hann hug at breiða seg og tí hevur eisini nógvur svartjaftur verið at fáa undir Íslandi.

- Men í ár hevur onki verið at fáa undir Íslandi hesa seinastu tíðina heldur.

Atli Hansen metir, at hetta er tekin um, at svartkjafturin aftur er farin at minka.

- Tað sær út til, at vit hava havt ein ella tveir góðar árgangir í fiskiskapinum, men nú eru teir farnir at ganga undan. Samstundis er metingin, at árgangirnir, sum nú er á veg í fiskiskapin eru meiri vánaligir.

Hann sigur, at í ár er føroyska kvotan 525.000 tons. Men tá ið vit hava handlað aftur og fram við kvotum, eru 338.000 eftir, sum føroysk skip kunnu fiska. Ein leyðslig meting sigur, at føroysk skip hava fiskað eini 300.000 tons í ár, so tað er á einari leið.

Hinvegin hava íslendingar eina kvotu upp á 320.000 tons í ár, men so vítt Atli Hansen veit, eru teir ikki nær í námind av tí.

Annars hava hini londini fiska sínar kvotur, so tilsamans er veiðan ikki langt frá tveimum millíónum tonsum aftur í ár.

Hann sigur, at tað gamla er, at fram ímóti ársloki kann nakað vera at fáa aftur, men tað verður ikki fyrrenn eftir nýggjár, í januar ella februar, at tann heilt stóri fiskiskapurin verður aftur og so er svartkjaftur at fáa til seinast á mai.

Og Atli Hansen heldur, at hetta er tað, sum vit skulu læra okkum at liva við í longdini.

Hesa tíðina ongin svartkjaftur hevur verið, hava skipini annars fiskað sild og makrel.

# Fiska eina millión tons ov nógv

**Svartkjafturin er væl fyri, men veiðitrýstið er alt ov høgt, sigur ICES í nýggjasta tilmæli sínum. Felagsskapurin mælir til, at fiskiskapurin verður minkaður munandi**

SVARTKJAFTUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Svartkjafturin er væl fyri, men veiðutrýstið alt ov stórt.

Tað sigur altjóða havrannsóknarstovnurin, ICES.

Hann hevur akkurát nú almannakunngjørt sínar nýggjastu metingar av støðuni hjá svartkjaftastovninum. Og ICES hevur eisini gjørt síni tilmæli um fiskiskapin næsta ár.

ICES sigur, at stovnurin er so væl fyri, at hann er fult førur fyri at framleiða góða tilgongd.

- Men veiðitrýstið er tó alt ov høgt, og stovnurin verður ikki troyttur burðardygt.

Rannsóknarstovnurin sigur, at seinastu tíggju árini hevur tilgongdin verið størri enn áður. Men nú eru ábendingar um, at 2005-árgangurin er minni aftur.

Í 2005 var heildarveiðan eftir svartkjafti næstan tvær milliónir tons.

Strandalondini samtyktu fyri nógvum árum síðani at seta eina langtíðar ætlan í verk fyri, hvussu fiskiskapurin eftir svartkjafti skuldi stýrast í samsvari við tilmælini hjá ICES.

Men tað hevur verið trupult at fingið semju um, nær og hvussu hon skal setast í verk. Í 2005 fekst tó semja í lag, har mest loyvda veiðan er hægri enn tað, sum ætlanin annars leggur upp til. Men so skal mest loyvda veiða minka 100.000 tons um árið, til veiðutrýstið er komið niður á eitt hóskandi støði.

ICES fagnast um, at ein avtala er gjørd, men metir ikki, at avtalan ímillum strandalondini um at minka mest loyvdu veiðuna 100.000 tons í mun til, er burðardygg.

Ístaðin mælir ICES til, at veiðan næsta ár í mesta lagi verður 980.000 tons. Men eftir avtaluni, sum nú er, verður mest loyvda veiðan næsta ár heili 1,9 milliónir tons ella meiri enn eina millión tons meiri enn ICES heldur vera ráðiligt.

## Annita og Finnur í sjálvdrátti

**Tríggir javnaðartingmenn og ein fólkafloksmaður bjóðaðu sær at vera við í uppskotinum um at verja samkynd, men tað vildi Tjóðveldisflokkurin ikki**

SAMKYND
*Finnur Jensen*
*finnur@sosialurin.fo*

Fleiri vildu upp í part. Men í seinasta enda stóðu bert Finnur Helmsdal og Annita á Fríðriksmørk sum avsendarar av uppskotinum um at »skoyta kynsliga orientering« í mannamunsgreinina í revsilógini.

John Johannesen, Kristian Magnussen, Andias Petersen úr Javnaðarflokkinum og Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum bjóðaðu seg fram at vera við fyri at fáa eitt breiðari grundarlag undir uppskotinum, men tað hevði ongan áhuga. John Johannesen rør nú upp undir, at Tjóðveldisflokkurin misnýtir málið til egnan fyrimun.

- Allarhelst vil Tjóðveldisflokkurin koyra hetta málið solo fyri at fáa uppmerksomheit heldur enn so góðar sømdir fyri tey samkyndu sum gjørligt, sigur John Johannesen.

Tað var annars ætlanin, at sjey av átta tingfólkum frá Tjóðveldisflokkinum skuld standa sum avsendarar, men hetta bleiv av ongum, tí Páll á Reynatúgvu ikki vildi vera við.